## Trý pør kappast um finalurnar

Síðstu fimm árini hava Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen dømt steypafinaluna í manshondbólti, men so verður ikki í ár, tí tá eru teir báðir í Íslandi í altjóða dómaraørindum. Dánjal Samuelsen er burturstaddur, so tí fáa hann og Heri Petersen heldur ikki dømt. Sostatt stendur kappingin um finaluna millum dómarapørini Hans Thomassen & Hanus Kúrberg, Birgir Sondum & Thomas Dam og Rúna Gunnarsson & Ragnar Simonsen.



## Sleppa at royna gólvið

Tá steypafinalurnar hjá teimum vaksnu í Coca-Cola kappingini verða spældar í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin 13. februar, verður spælt á serliga hondbóltsgólvinum, ið eitt nú hevur verið brúkt til landsdystir. Men eisini dagin eftir verða spældar steypafinalur á sama stað, so tey yngru kunnu sleppa at royna seg á sama gólvi sum tey vaksnu. Hetta var roynt fyrstu ferð í fjør við sera góðum úrsliti.

### StÍF-KÍF 26-28 (15-13):

# Kollfirðingar halda stílinum

**Aftur hesa ferð kom stríðsviljin KÍF tilgóðar, tá teir móti dystarenda koppaðu uppgerðini móti StÍF**




Jákup Mørk




**Leingi høvdu strandingar tamarhald á støðuni, men sum ikki einaferð prógvaði KÍF, at teir stríðast til dómarin hevur bríkslað fyri seinastu ferð**

Mynd: Álvur Haraldsen

Hondbóltsfepurin er høgur í Kollafirði. Eftir at KÍF allan fyrsta partin av kappingini var einsamalt í botninum, er liðið nú ájavnt H71 í stríðnum um pláss í FM-finaluni.

Fyrst og fremst hevur tað verið ein ófatuligur stríðsvilji, sum hevur betra støðuna somikið nógv, og hesin kom teimum eisini til góðar í gjár.

Størsta partin av dystinum var tað nevnliga StÍF, sum var omaná í gjár. Teir hildu seg støðugt á odda, og tá Ási Dam mátti av vølli eftir beinleiðis reytt kort, var hetta steinur oman á byrðu.

Hetta var tó langt ífrá einasta reyða kortið sunnudagin. Longu undan steðginum fekk Borgar Danielsen hjá StÍF sína triðju útvísing, og tað munaði sum vera man væl hjá gestunum.

Eftir steðgin var KÍF eisini nógv betur við, men tað gekk tó sera javnt á allan vegin. Enn eitt reytt kort – hesa ferð til Gabriel Stanciu hjá StÍF – darvaði tó aftur vertunum, og so var tað, at KÍF tók av.

Niklas Reginsson hevði verið stórspælandi allan dystin, og við trimum málum svaraði hann aftur, hvørja ferð StÍF royndi at fáa fatur á dystinum aftur.

Tvey stig afturat til KÍF, og so eru teir saman við H71 á næst fremsta sessinum í deildini.

Í so máta er talan um púra øvuta støðu á stigatalvuni. Fyri fyrstu ferð í eini 15 ár ella so kann talan verða um niðurflyting úr bestu mansdeildini. Og tað liggur ikki serliga nær vanligu hondbóltsfatanini, at tað eru StÍF, VÍF og Kyndil, sum í løtuni stríðast fyri at sleppa av hesum plássinum.

### H71-VÍF 38-32 (21-16):

# H71 fekk gongd á

**Fyri fyrstu ferð síðani 8. desember fór H71 av vøllinum við tveimum stigum, tá teir spældu og stríddu VÍF niður og norð**




Jákup Mørk

Hóast tað er finaluplássið, sum tey flestu tosa um, so hevur tað verið lítið hugaligt hjá meistarunum úr H71 at síggja, at liðið hevur veri ðá niðurflytingarkós í vetur.

Seinastu umførini hevur gingið heilt illa, og tað var fyrst og fremst hetta, sum skuldi broytast sunnudagin. Og tað varð tað eisini.

### Sterkt kollektiv

Fyrst og fremst, so var sigurin sunnudagin eitt úrslit av einum sterkum kollektivi, har hvør tann einasti av spælarunum støðugt helt seg til spælkonseptið hjá liðnum.

Í so máta er ilt at taka nakran einstakling framum. Men Jens Skipagøta, sum annars var sjálvpensioneraður eftir FM-heitið í fjør, stóð ein frálíkan dyst í málinum, har hann steðgaði vestmenningum, hvørja ferð teir hóttu við at koma aftur í dystin. Og á bakkinum spældi Esbern Patursson ein framúr dyst, har hann støðugt krossaði framvið VÍF-verjuni, og á tann hátt átti sína hond í meira enn øðrum hvørjum máli, sum hoyvikingarnir skutu.

### Tamir vestmenningar

Meðan hoyvíkingar soleiðis høvdu alla orsøk at vera nøgdir, var tað sama avgjørt ikki galdandi fyri VÍF, sum í nógvar mátar vóru sera tamir.

Teir mistu takið, tá teir við 9-9 skuldu havt fyrimun av eini útvísing til H71. Men ístaðin broyttist støðan til 13-9, tá VÍF um sama mundið eisini fekk eina útvísing.

Ongan tíð eftir hetta sat áskoðarin við varhuganum av, at VÍF var á veg aftur í dystin, og tað ber við sær, at VÍF nú aftur er á niðurflytingarplássi. Gaman í við bara einum stigi upp til finaluplássið, men skal hetta røkkast, má avrikið á vøllinum vera eitt heilt annað, enn tað var sunnudagin.

### VB-VÍF 26-29 (15-16):

# VB mest sum farið

**Tilveran hjá VB í Sunsetdeildini hongur nú í sera klønum tráð. Sunnudagin var VB væl við, men tað gjørdist ov lítið móti VÍF, sum nú er mest sum tryggjað**




Jákup Mørk

Hjá bæði VB og VÍF er talan í vetur um kappingarár, har byrjað verður av nýggjum.

Tey bæði liðini hava hvør í sínum lagi vunnið FM-heitið seinasta 10-ára skeiðið, men við blaðungum spælarum á flestu plássunum er tað ikki hetta, sum hevur verið fremst í huganum í vetur.

Hjá VB hevur støðan eisini viðført, at felagið sá seg noytt at styrkja um hópin, og eingin ivi er um, at nýggi spælarin, Migle Senvaityte, gjørdi sítt sunnudagin.

Hon stóð nevnliga fyri 14 av málunum hjá VB í dystinum, men hetta var kortini ikki nóg mikið móti einum VÍF-liði, sum spakuliga hevur funnið størri og størri støðufesti í spælinum.

Stóri skjúttin hjá vestmenningum hevur alt árið verið Liljan Djurhuus, men hon varð sera væl vard hesaferð. Tað gav tó eisini rúm til aðrar spælarar, og í stóran mun vóru tað hesar, sum tóku av og avgjørdu dystin sunnudagin.

Matematiskt er VB ikki fokið enn. Men tað er eingin ivi um, at tær nú hava knívin at barkanum. Komandi vikuskifti spælir VB heima móti StÍF, og gevur tann dysturin tvey stig, kann VB við sigri í útidystunum móti VÍF og StÍF toga seg upp á javnstøðu við tey bæði í stigum.

Hjá VÍF tykist talan hinvegin vera um reina succés hetta kappingarárið. Byrjanin var alt annað enn løtt. Men støðugt hevur verið arbeitt víðari við konseptinum, ið longu nú tykist bera somikið langt, at liðið kann veitra farvæl til allan niðurflytingarvanda.